SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Landssjúkrahúsið - Oyrna-Nasa-Hálsdeildin - B4

## Vegleiðing fyri vaksin og børn, tá nasapolyppur verða tiknar

**Fyrireiking**:
Vanligt er at møta sama dag, sum skurðviðgerðin verður gjørd. Snýr tað seg um eitt barn, kann annað av foreldrunum fylgja barninum allan vegin, til tað er sovnað inni á skurðstovuni.

**Kvøldið fyri skurðviðgerðina skal tú FASTA frá kl. 24:00**

**Fyrireikingar á deildini**:
Tablettir, tilráddar av narkosulækna, verður givið. Børn fáa EMLA-plástur (Lokaldoyvandi) á handabakið. Undir skurðviðgerðini skalt tú ikki hava neglalakk; ringar, hálsprýði ella tílíkt á. Langt hár skal vera bundið upp.

Viðgerðin fer fram í fullari doyving, og varir í uml. ein ½ tíma. Av skurðstovuni verður tú koyrdur beinleiðis inn í viðrakning, har fólk eru um teg, til tú ert heilt vakin, og verður koyrdur á deildina.

Annað av foreldrunum kunnu vera við barninum inni í viðrakning.

**Aftaná skurðviðgerðina**:
Vanliga verður tú útskrivaður sama dag, tá oyrna-nasa-hálslæknin hevur hugt í hálsin. Snýr tað seg um eitt barn, skal onkur vaksin verða um barnið fyrsta døgnið.

**Kostur**:
Sama dag verður viðmælt, at tú bert etur kalt flótandi. Hareftir vanligan mat.

**Pína**:
Vanligt er at verða eymur og hava pínu fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðina. Mælt verður tá til at taka t.d. Panodil, sum fæst í hondkeyp á apotekinum. Ísur kann eisini linna væl um pínuna og eymleikan.

**Fepur**:
Fært tú fepur, set teg tá í samband við kommunulæknan/Læknavaktina, tlf. 1870.

**Skúli / Barnagarður**
Vit viðmæla at barnið er heima 1-2 dagar eftir skurðviðgerðina og vit fráráða harðligt spæl/ítrótt.

Um tit hava spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til okkara á ONH.

Tlf. 304622 / Teldupostbúðstaður: skurðinfo@ls.fo

Okt. 2025